# Fíggjarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 03.11.2023 |
| Mál nr.: | 23/20623 |
| Málsviðgjørt: | JEK |
| Ummælistíð: | N/A |
| Eftirkannað: | 24.10.2023 |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin)**

(Skattaumskipan 2024 og 2025, stigvís minking av fiskimannafrádráttinum og avtøka av samdøgursfrádráttinum og uttanlandsfrádráttinum)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin), sbrt. løgtingslógarkunngerð nr. 109 frá 19. september 2023**,** verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 25 b verður strikað.

**2.** Í § 33, nr. 12 verða 3. og 4. pkt. orðað soleiðis:
"Frádrátturin, sum verður veittur sum ein samdøgursfrádráttur, kann tilsamans ongantíð verða størri enn skattskylduga uttanlandsinntøkan. Frádrátturin er í
a) 2024: kr. 240.
b) 2025: kr. 180.
c) 2026: kr. 120.
d) 2027: kr. 60."

**3.** § 33, nr. 12 verður strikað.

**4.** § 33, nr. 13 verður orðað soleiðis:
"13) 30% av skattskyldugari inntøku, sum er fevnd av § 25 b, stk. 1, tó í mesta lagi:
a) Fyri 2024: kr. 96.000.
b) Fyri 2025: kr. 72.000.
c) Fyri 2026: kr. 48.000.
d) Fyri 2027: kr. 24.000."

**5.** § 33, nr. 13 verður strikað.

**6.** § 33, nr. 17 verður orðað soleiðis:
"17) 14% av veiðiinntøkuni upp til:
a) Kr. 400.000 fyri 2024.
b) Kr. 300.000 fyri 2025 og fylgjandi ár."

**7.** § 154 b verður strikað.

**§ 2**

*Stk. 1.* § 1, nr. 2, 4 og 6 og 7 koma í gildi 1. janúar 2024.

*Stk. 2.* § 1, nr. 1, 3 og 5 koma í gildi 1. janúar 2028.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Landsstýrið hevur gjørt av at seta í verk eina skattaumskipan, sum minkar inntøkuskattin. Tað skal loysa seg betur at arbeiða.

Síðstu nógvu árini er skattabyrðan flutt frá avgjøldum til inntøkuskatt.

Orsøkin er, at hvørki skattastigi ella avgjøld verða javnað við prís- ella lønarvøkstri. Avgjøldini eru í størstan mun ásett sum føst krónuupphædd fyri hvørja eind, meðan skattastigini í stigvaksandi skattaskipanini eru føst.

Frá 2016 til 2022 eru ongar broytingar av týdningi gjørdar í landsskatti ella søluavgjøldum og innflutningsavgjøldum.

Lønarvøkstur og ein skattastigi, sum ikki verður javnaður, gera, at inntøkurnar frá landsskatti eru vaksnar til um 2 mia. kr. í 2022, sum er ein vøkstur á út við 50 prosent síðani 2016, meðan avgjøldini eru óbroytt um 250 mió. kr. um árið.

Hetta er við til at trýsta føroyska arbeiðsmarknaðin, tí skatturin hækkar hjá teimum, sum arbeiða í Føroyum, meðan hann í veruleikanum minkar hjá teimum, sum arbeiða uttanlands og ikki rinda inntøkuskatt her í landinum.

Lógaruppskotið er liður í eini skattaumskipan, ið fevnir um hesi lógaruppskot:

- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um endurgjald til kommunur vegna frádráttir og serskattaskipanir (Skattaumskipan 2024 og 2025, tillaging av endurgjaldi til kommunurnar vegna stigvísa minking av fiskiveiðifrádráttinum og avtøka av uttanlandsfrádráttinum)
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um serligt avgjald á brenniolju (Skattaumskipan 2024 og 2025, hækking av brennioljugjaldinum)
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi (Skattaumskipan 2024 og 2025, hækking av punktgjøldum á brennievni og broyting av heiti)
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin) (Skattaumskipan 2024 og 2025, stigvís minking av fiskimannafrádráttinum og avtøka av samdøgursfrádráttinum og uttanlandsfrádráttinum)
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin) (Skattaumskipan 2024 og 2025, javning av skattastiganum)

| Lógaruppskot | Hvat | Fíggjarlig ávirkan 2024 | Fíggjarlig ávirkan 2025 | Fíggjarlig ávirkan 2026-2028 | Samanlagt 2024 til 2028 |
|---|---|---|---|---|---|
| Ásetingarlógin | Landsskattatalva - skattaumleggingin | 100 | 100 | 0 | 200 |
| Skattalógin | Broyting í frádráttum vm. | -13 | -15 | -25 | -53 |
| Serligt avgjald á brenniolju | hækking av avgjaldinum og strikan av afturbering | -50 | -35 | 0 | -85 |
| Framleiðsla og innflutningi | F-gass, bensin og diesel avgjøld hækka | -37 | 0 | 0 | -37 |
| **Samanlagt** | | **0** | **50** | **-25** | **25** |

Talvan omanfyri lýsir ymisku lutirnar í skattaumskipanini 2024-28.Umframt inntøkur frá lógaruppskotunum í skattaumskipanini, koma 10 mió. kr. frá avgjøldum á f-gass. Sí uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi (Avgjøld á f-gass og ávísar rættingar í vørunumrum og øðrum).

Við hesum uppskotinum verða gjørdar broytingar í serligum skattaskipanum sum liður í skattaumskipanini.

Ein nærri greining av skattaumskipanini er í fylgiskjali 2, *Skattaumskipan 2024 og 2025*.

### 1.2. Galdandi lóggáva
Galdandi lóggáva hevur serreglur fyri ávísar løntakarar.

*Uttanlandsinntøka*
Uttanlandsinntøka verður skattað aftan á ein inntøkufrádrátt á 30% av ársinntøkuni, tó í mesta lagi 120.000 kr. Av skattskyldugu inntøkuni verður síðani goldin ein flatskattur á 35%.

*Fiskivinnuinntøka uttanlands - øll Norðurlond, uttan Grønland*
Føroyingar, ið sigla við norðurlendskum fiskiskipum, skulu gjalda allan skattin í Føroyum.

Skattaskylduga inntøkan er inntøkan aftan á fiskimannafrádrátt á 14% av inntøkuni upp til 470.000 kr. og samdøgursfrádrátt á 300 kr. um dagin.

Verður gjald rindað sambært nordisk konvention om social sikring, *Folketrygd*, verður nevnda gjald roknað sum skattur goldin uttanlands.

*Grønland*
Føroyingar, ið sigla við grønlendskum fiskiskipum, skulu geva inntøkuna upp í Føroyum, men gjalda bert skatt í Grønlandi av inntøkuni.

*Onnur lond*
Fiskimenn við øðrum skipum, enn norðurlendskum og grønlendskum, skulu skattast í Føroyum av inntøkuni.

Skattaskylduga inntøkan er inntøkan aftan á fiskimannafrádrátt á 14% av inntøkuni upp til 470.000 kr. og samdøgursfrádrátt.

Er skattur goldin uttanlands, verður frádráttur latin í føroyska skattinum fyri goldnan skatt, tó í mesta lagi upp til tað skattaprosent, sum hevði verið rindað í Føroyum av hesi inntøkuni.

*Fiskivinnuinntøka innanlands*
Skattaskylduga inntøkan er inntøkan aftan á fiskimannafrádrátt á 14% av inntøkuni upp til 470.000 kr.

*Samdøgursfrádráttur*
Persónar, ið arbeiða umborð á norðurlendskum fiskiskipi ella ferðafólkaflogfari, umframt persónar, sum hava inntøku undir DIS, hava rætt til samdøgursfrádrátt. Treytin fyri at fáa samdøgursfrádrátt er, at arbeitt verður í minsta lagi í 2 mánaðir uttan slit ella 100 samdøgur í einum 12 mánaða tíðarskeiði.

*§ 154 b í skattalógini*
Sambært § 154 b í skattalógini verður gjald, sum er goldið til eitt annað land enn Føroyar og sum er fevnt av norðurlendsku konventiónini um sosiala trygd, talt við sum ein skattur, goldin í Norðurlondum.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at javnseta føroyingar skattliga.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Við uppskotinum verða:

- fiskimannafrádrátturin,
- samdøgursfrádrátturin og
- uttanlandsfrádrátturin

lækkaður yvir eitt áramál og síðani verða samdøgursfrádrátturin og uttanlandsfrádrátturin strikaðir.

Fiskimannafrádrátturin verður lækkaður.

§ 154 b í skattalógini verður strikað, tí mett verður, at grundarlag ikki er fyri ásetingini, eftir at persónar, fevndir av nordisk konvention om social sikring, eru frítiknir fyri at rinda gjald til samhaldsfasta og heilsutrygd.

Sambært Norðurlendsku konventiónini um sosiala trygd er persónur sosialt tryggjaður og skal rinda sosial gjøld í landinum har viðkomandi arbeiðir. Til dømis skal persónur, sum býr í Føroyum og arbeiðir i Norra, gjalda til NAV. Tað er møguligt at fáa undantak, so viðkomandi í staðin er sosialt tryggjaður í Føroyum. Tað verður avtalað við norsku myndugleikarnar í hvørjum einstøkum føri. Ein treyt fyri undantøku er, at viðkomandi ístaðin rindar øll áløgd sosial gjøld í Føroyum, t.v.s. als, heilsutrygd, barsil og samhaldsfasta. Konventiónin fevnir um øll Norðurlond.

Tað er ein grundleggjandi samanhangur í Norðurlendsku konventiónini um sosiala trygd, at ein persónur kann bert vera sosialt tryggjaður í einum Norðurlandi, og viðkomandi kann bert verða álagdur at rinda sosial gjøld í tí landi, viðkomandi er tryggjaður. Í nevnda dømi ber so statt ikki til at vera sosialt tryggjaður bæði í Norra og Føroyum, og tí kann ein persónur, sum býr í Føroyum, ongantíð verða álagdur at gjalda til NAV og at gjalda til als, heilsutrygd, barsil og samhaldsfasta fyri sama tíðarskeið.

Tá sosial gjøld bert skulu gjaldast í einum Norðurlandi, og til ber ikki at verða álagdur at gjalda sosial gjøld í tveimum ella fleiri Norðurlondum fyri sama tíðarskeið, er ikki viðkomandi at telja sosial gjøld við í sambandi við avtøku av tvískatting millum Norðurlond.

Tað er í andsøgn við endamálið við reglunum um tvískatting, at frítøka verður latin í skattinum fyri eitt gjald, sum viðkomandi er frítikin at gjalda í Føroyum.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Uppskotið hevur ikki verið til hoyringar.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Skattaumskipanin verður fíggjað við at niðurlaða nakrar av serskipanunum á arbeiðsmarknaðinum og við at dagføra, javna og stigvíst hækka avgjøldini á olju soleiðis, at rindað verður í størri mun fyri útlát av vakstrarhúsgassi. Ætlanin er eisini at áseta avgjøld á innflutningin av f-gassi, sum er sterkt vakstrarhúgass. Víst verður til uppskotini um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi, uppskot um broyting løgtingslóg um áseting av skatti, uppskot um broyting í løgtingslóg um endurgjald til kommunur vegna frádráttir og serskattaskipanir og uppskot um broyting í løgtingslóg um serligt avgjald á brenniolju.

Harafturat eru hægri tilfeingisgjøld, sum vórðu samtykt í 2023, eisini við til at fíggja skattaumskipanina.

**Serskipanir**

At hava serligar skattaskipanir til partar av arbeiðsmarknaðinum avlagar arbeiðsmarknaðin.

Tí verða stig tikin til stigvíst at taka av uttanlandsfrádráttin og samdøgursfrádráttin og minka fiskimannafrádráttin.

*Fiskimannafrádrátturin minkar*

Fiskimannafrádráttur minkar í tveimum. Mesti frádrátturin, sum í dag er 14% av 470.000 kr., verður lækkaður niður í 400.000 kr. í 2024 og 300.000 kr. í 2025. Mett verður, at tað gevur tilsamans 11 mió. kr.

*Uttanlandsfrádrátturin avtikin yvir 5 ár*

Skatturin av uttanlandsinntøku er í dag 35%, men fyrst skulu 30% dragast frá upp til 120.000 kr. Hetta merkir, at skatturin av fyrstu 400.000 krónunum er 24,5% og síðani 35% av restini. Uttanlandsfrádrátturin, sum er upp til 120.000 kr., verður avtikin yvir 5 ár. Hámarkið verður lækkað árliga við 24.000 kr., til frádrátturin er heilt burtur í 2028. Mett verður, at hetta gevur um 38 mió.kr. at avtaka uttanlandsfrádráttin.

Fyri vinnuna ber broytingin í sær, at útboðið av faklærdari arbeiðsmegi helst gerst størri, og at lønartrýstið tí alt annað líka gerst minni.

*Samdøgursfrádrátturin avtikin yvir 5 ár*

Samdøgursfrádrátturin, sum í dag er 300 kr. um dagin, verður lækkaður við 60 kr. hvørt ár soleiðis, at hann er heilt burtur í 2028. Mett verður, at tað gevur tilsamans 5 mió. kr. at avtaka samdøgursfrádráttin.

Hugsanin við samdøgursfrádráttinum er at leggja upp fyri teimum serligu útreiðslunum, sum krevjast fyri at kunna arbeiða uttanlands, so sum ferðing, gisting o.a. Í allar flestu førum er tað tó arbeiðsgevarin, sum rindar hesar útreiðslurnar, og tí virkar frádrátturin sum ein stuðul til arbeiði uttanlands.

*§ 154 b frádrátturin avtikin*
Sambært verandi skattalóg fáa tey, ið arbeiða uttanlands, frádrátt í skattinum fyri sosialgjøld uttanlands.

Eftir at staðfest er, at bæði heilsutrygdargjaldið og gjaldið til samhaldsfasta eru fevnd av norðurlendsku sosialkonventiónini, er ikki longur grundarlag fyri hesari áseting. Tí verður hesin frádráttur strikaður.

Víst verður til hjálagda fylgiskjal 2 *Skattaumskipan 2024 og 2025.*

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur jaligar umsitingarligar avleiðingar fyri TAKS. Við at strika serskipanir gerst skattaskipanin einfaldari.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið hevur jaligar umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna. Tá m.a. uttanlandsfrádrátturin verður strikaður, gerst tað lættari fyri vinnuna at útvega sær faklærda føroyska arbeiðsmegi.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Uppskotið hevur avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

Aðalendamálið við uppskotinum er at javnseta føroyingar skattliga. Hetta verður gjørt við at strika serreglur í skattalógini yvir eitt áramál.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Mett verður, at lógaruppskotið samsvarar við *Hoyvíkssáttmálan* (Sáttmáli millum stjórn Íslands, øðrumegin, og stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri, hinumegin), *Evropeiska mannarættindasáttmálan*, sambært Anordning nr. 136 af 25.Februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention, og *Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek*, sambært bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap.

**2.9. Markaforðingar**
Tað eru ikki kendar markaforðingar á økinum.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir og ger heldur ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki

**2.11. Skattir og avgjøld**
Talan er um eitt skattauppskot.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar, enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

## 2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Ja | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**

**§ 1, nr. 1**
Eftir at uttanlandsfrádrátturin stigvíst er lækkaður við kr. 24.000 um árið, verður ásetingin strikað 1. januar 2028.

**§ 1, nr. 2**
Við ásetingini verður samdøgursfrádrátturin stigvíst lækkaður úr kr. 300 niður í kr. 60 1. januar 2027.

**§ 1, nr. 3**
Eftir at samdøgursfrádrátturin stigvíst er lækkaður við kr. 60 frá 2024 at rokna, verður ásetingin strikað 1. januar 2028.

**§ 1, nr. 4**
Við ásetingini verður sonevndi uttanlandsfrádrátturin stigvíst lækkaður við kr. 24.000 um árið fyri síðani at verða strikaður 1. januar 2028, sbr. § 1, nr. 2 og 6.

**§ 1, nr. 5**
Eftir at uttanlandsfrádrátturin stigvíst er lækkaður við kr. 24.000 um árið frá 2024 at rokna, verður ásetingin strikað 1. januar 2028.

**§ 1, nr. 6**
Við ásetingini verður sonevndi fiskimannafrádrátturin stigvíst lækkaður fyrst við kr. 70.000 í 2024 og síðani við kr. 100.000 í 2025.

**§ 1, nr. 7**
Við ásetingini verður mælt til at strika § 154 b í skattalógini, tí mett verður, at grundarlag ikki er fyri ásetingini, eftir at persónar, fevndir av nordisk konvention om social sikring, eru frítiknir fyri at rinda til samhaldsfasta og heilsutrygd.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Stk. 1.
Við ásetingini verða samdøgursfrádrátturin, uttanlandsfrádrátturin og fiskimannafrrádrátturin árliga lækkaðir frá 1. januar 2024 at rokna.

Frádrátturin fyri gjaldið, sbrt. nordisk konnventionn om social sikring, verður strikaður frá inntøkuárinum 2024 at rokna.

Stk. 2.
Eftir at fiskimannafrádrátturin, uttanlandsfrádrátturin og samdøgursfrádrátturin árliga eru lækkaðir, verða frádráttirnir strikaðir 1. januar 2028.

Fíggjarmálaráðið, 03. november 2023

**Ruth Vang**
landsstýriskvinna

/ Bjarni Askham Bjarnason

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Skattaumskipan 2024 og 2025